## Fogh millum teir bestu

Anders Fogh Rasmussen bleiv dúgliga róstur, tá hann legði frá sær sum formaður í Vinstra í gjár eftir at hava verið formaður í níggju ár. Lars Løkke Rasmussen, sum fyrst tók við sum forsætisráðharri og í gjár sum formaður í Vinstra, segði í røðu síni á landsfundinum, at Anders Fogh Rasmussen er ein tann besti forsætisráðharrin, sum Danmark hevur havt og ein tann mest virdi Vinstraformaðurin nakrantíð. Nýggi formaðurin rósti millum annað undanmanninum fyri avrikið, tá hann var formaður í ES, og hvussu hann handfór kreppuna av Muhammedstekningunum.



## Misnøgd við Aleqa Hammond

Í Grønlandi er fiski- og veiðimannafelagið KNAPK sera misnøgt við, at Aleqa Hammond, landstingslimur hjá Siumut, hevur lagt fiskimenninar undir grenj. Tað orðið brúkti hon, tá fiski- og veiðimannafelagið boðaði frá, at tað tekur undir við teimum fiskimonnunum, sum hava kravt endurgjald, tí Royal Greenland hevur gjørt av at lata fleiri av teimum smáu landingarstøðunum aftur. Formaðurin í KNAPK, Leif Fontaine, segði um vikuskiftið, at Aleqa Hammond nýtist ikki at hugsa um, hvussu hon skal fáa løn, og so eigur hon at minnast til, at fiskimenninir eru við til at útvega henni lønina.

# Nógvur materiellur skaði

**Fleiri ferðsluóhapp hava verið um vikuskiftið. Í fleiri førum kundi væl spælt verri av, um marginalarnir vóru øðrvísi, men tíbetur var talan bert um materiellan skaða í flestu førum**




*Ein bilførari fór sunnumorgunin tvørur av fleiri paragraffum í lógini og Ovara Vegi í Vestmanna, tá hann førdi ein bil, hann einki átti í, í vegjaðaran*

112
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Nógv ferðsluóhapp hava verið um vikuskiftið, og vildi verri til, kundi skaðin verið nógvar ferðir størri.

Leygardagin klokkan 11.08 varð boðað frá, at eldur var í einum bussi Millum Fjara. Talan var um ein leigaðan ferðafólkabuss, og nógv ferðafólk vóru í bussinum. Ferðafólkini vóru tó skjótt fingin úr bussinum, og eldurin var hildin undir tamarhaldi við eldsløkkjara til Skála Sløkkiliðið kom á staðið og fekk sløkt ordiliga.

Orsøkin til eldin er tann, at olja var likin niður á útstoytið, eftir at eitt stempul er farið út gjøgnum síðuna á motorinum, og tí er fest í.

Bussurin stóð við vegin til Oyndarfjarðar, og var talan tí bert um minuttir, áðrenn bussurin var í Norðskálatunnilinum, og tá kundi skjótt stór vanlukka staðist av tí.

### Frontalt samanstoyt við Streymes

Fríggjakvøld um klokkan 18 var eitt ferðsluóhapp í Streymnesi. Ein bilur á veg suðureftir skuldi snara inn á Neystaveg, og skuldi tí tvørtur um vegin. Á veg norðureftir er ein bilur við at yvirhála ein annan bil, og hesir báðir renna so saman, tá annar ikki hevur sæð hin. At síggja til var talan um eitt ógvusligt ferðsluóhapp, men tíbetur var eingin persónskaði.

Fríggjakvøldið datt ein drongur á einum scootara í Hósvík, og ambulansa var send á staðið. Hon var tó send avstað aftur, tá drongurin ikki hevði meiðslað seg illa.

Sunnunáttina datt ein drongur á knallert í Havn, og løgreglan hevur verið á staðnum. Tó var tað ikki so álvarsligt.

Sunnudagin var eitt ferðsluóhapp við rundkoyringina á Argjum, tá ein bilur eftir øllum at døma hevði trupulleikar við bremsunum, og rendi á ein lyktapela har. Eisini her var bert talan um materiellan skaða.

# Rúsdrekkakoyring ein afturvendandi trupulleiki

**Hetta vikuskiftið hevur verið eitt av teimum turru, men heldur vátligu. Fýra bilførarar eru tiknir fyri at koyra við kenning, og ein hevði enntá stolið og rent bilin útav**

112
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Tað tykist vera torført at fáa boðskapin til bilførarar í Føroyum, at rúsdrekka og koyring ikki hoyra saman.

Veðrið hevur verið av tí fagrasta, og bátastevnan í Vestmanna savnaði sera nógv fólk leygarkvøldið og sunnunáttina.

Hetta merkti løgreglan eisini aftur í teirra arbeiði, tá fleiri fólk hava trupult við at lata bilin standa, hóast tey eru ávirkaði av rúsdrekka.

Um klokkan 2 sunnunáttina varð ein bilur steðgaður í Kaldbaksbotni, og vísti tað seg sum at førarin var ávirkaður av rúsdrekka.

Tá sunnumorgunin nærkast, og dansurin á bátastevnuni er av, steðgar løgreglan einum bili omanfyri Kvívík. Hesin førarin hevði verið á bátastevnu, og ætlaði sær at koyra til hús, hóast hann ikki var nóg edrúur til at føra bil.

### Tvørtur um lóg og veg

Ein bilførari helt sunnumorgunin um klokkan 8 seg heilt víst hava fatur í tí rætta, tá hann settist aftanfyri róðrið.

Hvørt tað var rúsdrekka ella okkurt annað, ið hevði ávirkað evnini at skyna munin á røttum og rangum, er ilt at gita, men tá til stykkis kom, var førarin farin tvørur av bæði lógini og vegnum í einum bili, hann einki átti í sjálvur.

Hann hevði nevniliga stolið bilin, og var farin útav Ovara vegi í Vestmanna.

Klokkan 9 sunnumorgunin royndi ein ikki heilt edrúur bilførari helst at sníkja seg til Havnar eftir Oyggj. Á Oyggjarvegnum rendi hann seg tó í lógina, og varð tikin av løgregluni, ið helt eyga við bilum á Oyggjarvegnum.

## Álvarsligt ferðsluóhapp við Saltangará

Eitt álvarsligt ferðsluóhapp var við Saltangará um vikuskiftið. Fríggjakvøldið um midnátt rendu ein knallert og ein bilur saman við Statoil við Saltangará. Førarin av knallertini fer sendandi, og hevur fingið ein snudd á høvdið. Tá løgreglan kemur á staðið er hann ikki við vit, og verður sendur á landssjúkrahúsið.

So vítt sum løgreglan veit, er hann ikki vorðin við vit aftur, og varð sendur niður á Ríkissjúkrahúsið í gjár.

Tað framgongur ikki av rapportini, um førarin av knallertini var í hjálmi ella ikki.

**- RN**